# DAGURIN ER B
# UM EG FINNI EI

**LIVIKOR** **Hóast Beinta og Inger, sum báðar eru stakir uppihaldarar, arbeiða fulla tíð, kemur tað meiri enn so fyri, at tær hava ikki ráð til mat. Hjá tí almenna er ongin hjálp at heinta, so tær liva av olmussum og takka Gudi fyri eitt gott netverk.**

Rigmor Dam

Heilt erligt – fá tær bara ein ríkan mann.. ella ein sjómann.

Hendan setningin hava tær báðar, Inger Olsen og Beinta Lundsbjerg, sum báðar eru stakir uppihaldarar, ofta fingið slongjandi í høvdið, tá tær hava kært seg um penganeyð.

Tí í Føroyum tosar man ikki um pengar. Og slett ikki um egnar pengar – ella mangul upp á pengar.

Man kann jú bara lata vera við at vera einsamøll, tykist hugburðurin at vera. Tað hava tær báðar kvinnurnar mangan kent á sær, tá harðast hevur leikað á.

– Halda tey, at man bara skal fáa sær ein mann, tí hann eigur pengar? Nei, eg vil hava ein mann, sum eg elski, sigur Inger, sum er einsamøll við 6 ára gomlu dóttrini, eftir at hon og fyrrverandi maðurin fóru hvør til sítt fyri nøkrum árum síðani. Seinastu tvey árini hava hon og dóttirin búð fimm ymsa staðni í Eysturoynni, tí tað er so dýrt at leiga. Nú hava tær funnið eina íbúð fyri 3000 krónur umframt el og hita, og lægri verður ein húsaleiga valla í Føroyum í dag.

### Dýrt at skiljast

Men hví hava Inger og Beinta ongar pengar? Tvær sterkar, útbúnar kvinnur í bestu árum við almennum fulltíðarstørvum og eyka størvum, tá tey eru tøk.

– Tað er jú bara ein inntøka til alt. So tað sigur seg sjálvt, at korini eru trong. Ein stakur uppihaldari skal rinda fullan prís fyri alt, sum onnur eru tvey um at gjalda. So sum telefon, leigu, tryggingar, kringvarp, dagstovn, sev og olju. Og børnini skulu eisini hava sítt, forklárar 30 ára gamla Beinta, sum, eins og vinkonan Inger, hevur nøkur smærri lán at dragast við í sambandi við skilnaðin.

Tær vísa í hesum sambandi á, at hjá næstan øllum er tað rættiliga kostnaðarmikið at skiljast, tí partarnir mugu keypa hvønn annan út ella selja hús og bil við missi.

### Ikki pengar til mat

Hon hevur 1500 krónur eftir til mat, klæðir og frítíð, tá føstu útreiðslurnar eru goldnar. Skrivstovukvinnan Beinta. Og vinkonan Inger, sum er fólkaskúlalærari, hevur millum 2-3.000 krónur eftir.

– Øll orkan fer til at spekulera upp á, hvussu eg fái pengarnar at røkka. Hvørt einasta oyra fer til mat, og har er ikki ein króna til nakað sum helst annað. Hetta lívið er sum at ganga á nálum, forklárar Beinta.

– Eg verið so himmalska fegin, tá eg finni eina 20 krónu í botninum á taskuni ella í einum lumma. So meti eg, um hon skal fara til breyð ella mjólk. Rokni út, hvat heldur longst og kostar minst. Eisini so sonurin kann fáa ein hampiligan matpakka við í barnagarðin, sigur hon.

Tær báðar uppliva meiri enn so, at peningur er ikki til mat. Tí takka tær eisini Gudi fyri, at familja og vinir traðka til, bæði peningaliga, men eisini á annan hátt, so tað heila ikki verður so tungt.

Tí tað er so hundadýrt at liva í Føroyum. Tað eru tær samdar um. Serliga fyrst í mánaðinum, tá pengar enn eru á kontuni og alt manglar har heima, so sum vesipappír, sjampoo, tannkrem, kryddarí og matpakkapappír. Tá alt er fylt upp aftur, er lønin uppi.

– Man kemur ikki undir 300 krónur fyri eitt innkeyp, sigur Inger, sum ikki hevur keypt sær eitt nýtt plagg í meiri enn tvey ár. Men hon dugir at síggja væl út, tí hon hevur lært seg at vera kreativa. Okkurt fær hon frá familjuni og annað verður lænt frá góðum vinkonum.

### Kunnu ikki luttaka

Men eitt er, at tær fáa ikki pengarnar at røkka til tað dagliga, og at øll orkan fer til at finna loysnir. Eitt annað, sum tær báðar dragast við, eru sosialu avleiðingarnar av at liva í tí, sum vit kundu rópt »lutfallsligum fátækradømi«.

Hetta merkir, at tað í stóran mun er ógjørligt at luttaka í tí, sum onnur halda vera natúrligt. Og vit biðja tær koma við nøkrum dømum um ymiskt, sum tær ikki hava ráð til vegna peningatrot.

Inger greiðir soleiðis frá:

– So siga vinkonurnar »Skulu vit ikki fara ein hugnaligan túr til Suðuroyar um vikuskiftið..«, og man situr bara har og hugsar: Hvussu skal eg nakrantíð fáa ráð til ein sovorðnan túr?

Og tær suplera hvørja aðra, meðan tær reksa upp dømini, so vit kunnu fáa ein




**1500 KRÓNUR**

**eftir um mánaðin til mat, klæði og frítíð, tá føstu útreiðslurnar eru goldnar.**